# Oyðin Oyggjarvegur

*Ferðslan í fyrrverandi høvuðsferðslusæðrini minkaði við góðum níti prosentum tá ið Kaldbakstunnilin lat upp. Kortini er løgreglan á varðhaldi. Serliga í vikuskiftunum*

HØGNI MOHR

Tað var ein stórhending í føroyskari samferðslusøgu, tá ið Oyggarvegurin varð latin upp fyri ferðslu í 1966. Hendan høvuðsæðrin knýtti av álvara Streymoynna saman, og í góða fjórðingsøld var vegurin álitið. Men fyri góðum 7 árum síðani broyttist alt. Hin 5. november í 1992 lat bergholið millum Kaldbaksbotn og Signabø upp. Hendan tórsdagin hvarv Oyggjarvegurin so at siga í gloymskuna.

Gerandisdagar sæst onkur hissini lastbilur kanska við Hundsáarbotn, og fleiri minuttir eru ímillum persónbilarnar. Norða- og mjørkadalsmenn koyra uttan stórvegis hóvasták millum heim og arbeiðspláss um morgnarnar og kvøldarnar. Annars valdar at kalla fullkomuligur friður á hesum áður so væl vitjaða vegi.

**Vikuskiftiskoyring**

Móti morgni í vikuskiftunum kemur kortini fyri, at Oyggjarvegurin verður nýttur til meira illgrunaverd endamál.

Løgreglan í Havn er fleiri ferðir komin fram á bilførarar, ið við stívari kenning royna at lirka seg heim eftir hesum nú oydna vegi. Oftast er talan um menn, ið koma til Havnar í dans norðanífrá. Hesir bilførarar halda sambært løgregluni, at á Oyggjavegnum er friður, og frítt at fara. Men teir fara skeivir.

Petur Poulsen, vakthavandi á løgreglustøðini í Havn, sigur, at snimma vikuskiftismorgnar ger løgreglan nøkur rend niðan á Oyggjar-vegin við tí endamáli at avmarka rúsdrekkakoyringina. Somuleiðis hevur verið at hoyrt, at Oyggjarvegurin verður nýttur til rasarakoyring.

- Men vit halda eygað við Oyggarvegin, og eg haldi at skilaleysa rasarakoyringin er minkað munandi, tí fólk vita, at vit eru har uppi við jøvnum millumbili, sigur Petur Poulsen.



*Sambært hagtølum hjá Landsverksfrøðinginum koyra bert eini tíggju bilar koyra eftir Oyggjarvegnum um tíman*
**Mynd: Jens Kristian Vang**

**Munandi ferðsluminking**

Hendan eygleiðing av Oyggjarvegnum fellur neyvan løgregluni serliga tung í mun til áður. Sambært tølum hjá Finnleif Durhuus á landsverkfrøðingsstovninum, minkaði ferðslan á Oyggjarvegnum úr 2562 akførum og niður á 201 um samdøgurið. Samstundis vaks ferðslan í Hoydølum úr 4551 og upp í 6139 akfør. Í dag koyra í meðal 286 akfør eftir Oyggarvegnum. Gjøgnum Kaldbakstunnilin fara 3208 akfør.



*– Tevjisansurin hjá hundi er 80.000 ferðir betri enn hjá fólki, sigur Karsten*
**Mynd: Jens Kristian Vang**

# Hørð hundakapping

*Hundaførarin, Karsten Hansen, hevur sett sær fyri, at føroyski politihundurin, Pedro, skal gerast millum teir bestu í ríkinum*

DÁNJAL HØJGAARD

Pedro er ein góður hundur. Men hann kann gerast enn betri.

Hundaførarin Karsten Hansen hyggur stoltur at tí stóra sjefarahundinum, sum melur í klingur við snoddinum niður í jørðina.

Einaferð um vikuna er hundapatruljan hjá politinum úti og venur. Mikudagin vóru teir við Norðadalsskarð og vandu hundarnar at leita.

Uppgávan ljóðar einføld. Pedro skal innan eitt avmarkað tíðarskeið finna nakrar lutir, sum onkur politistur hevur krógvað frammanundan.

Trý ára gamli sjefarin, Pedro, er ein av trimum góðkendum politihundum í Føroyum. Og ein av umleið 400 í danska kongaríkinum.

-Tevjisansurin hjá hundi er 80.000 ferðir betri enn hjá fólki, sigur Karsten.

**Patruljan kappast**

Teir hava verið úti síðani klokkan 9 í morgun og nú klokkan nærkast 4 hevur Pedro funnið tríggjar lutir: eitt patrónhylki, einar brillur og ein stóran klumt av hasji.

Norðanfyri Pedro og Karsten gongur ein annar politistur og ein annar politihundur. Eisini teir leita.

Tað er kapping í hundapatruljuni.

- Hundarnir verða flokkaðir í tríggjar bólkar, har bólkur 1 er tann besti. Pedro er góður. Hann er í bólki 2. Hinir báðir føroysku hundarnir eru í bólki 3, sigur Karsten, sum stílar eftir, at fáa Pedro upp í bólk 1.

Pedro, sum er uppkallaður eftir leiðaranum í hundapatruljuni, Peturi Viderø Hansen, letst ikki um vón.

Og kappingin við Norðadalsskarð er heldur ikki til stuttleikar. Tí tá Pedro er til arbeiðis hjá tollvaldinum er umráðandi, at snoddið er í fínasta lagi.

Eisini er umráðandi at hann aktar væl. Tí sum Karsten sigur:

- Eitt av fremstu endamálunum við at hava politihundar, er fyribyrging.

Hvussu nógvir lutir, ið eru eftir at finna vita Pedro og Karsten ikki. Tískil halda hundur og politistur fram at leita, eftir at Sosialurin hevur sagt farvæl.



# Skylda arbeiðsgevaranna at upplýsa løntakaran

*Allir arbeiðsgevarar skulu hava skyldu til skrivliga at upplýsa løntakararar um tey týdningarmestu viðurskiftini, sum eru galdandi fyri starvssetan ella arbeiði teirra, sigur Hans Pauli Strøm*

ÓLAVUR Í BEITI

Uppskot til løgtingslóg um skyldu arbeiðsgevaranna at boða løntakarunum frá um setanartreytir teirra er nú lagt fyri tingið, og er tað Hans Pauli Strøm, sum hevur lagt tað fram vegna Javnaðarflokkin.

Í almennu viðmerkingunum, sigur Hans Pauli Strøm, at endamálið við lógini er, at allir arbeiðsgevarar, almennir eins væl og privatir, stórir eins væl og smáir, skulu hava skyldu til skrivliga at upplýsa løntakararar um tey týdningarmestu viðurskiftini, sum eru galdandi fyri starvssetan ella arbeiði teirra.

– Hesar upplýsingar snúgva seg m.a. um upplýsingar um arbeiðið sjálvt, hvat arbeiðið snýr seg um, og hvussu tað er lagt til rættis, hvør tann ítøkiliga arbeiðsuppgávan er, um starvsstøðuna og starvsheitið hjá løntakaranum, um nær starvssetanin er byrjað, og um hon er tíðaravmarkað, um rætt til frítíð, um uppsagnarfreistir, um øll lønarviðurskifti og um arbeiðstíðirnar.

**Betri trygd**

Hans Pauli Strøm kunnar um, at tað eru fleiri bólkar av løntakarum, sum longu við lógaráseting ella millumpartaavtalu í ávísan mun hava greiði á hesum viðurskiftum. Øll starvsfólk eru t. d. fevnd av starvsfólkalógini. Sjómenn eru fevndir av løgtingslógini um sjómenn. Og innan fyri tað almenna fer annars eisini fram ein útgreining av starvsfólkapolitikkinum, sum m.a. ásetir upplýsingaskyldur arbeiðsgevarans langt út um tey minstamørk, sum henda lógin ásetir.



– Men í hesum førinum, sum í so nógvum øðrum, er tað ein bólkur - ein tann størsti bólkurin á arbeiðsmarknaðinum - sum er serliga illa fyri, og sum so at siga er uttan rættindi av hesum slagnum, sum lógaruppskotið snýr seg um. Tað eru tey tímaløntu. Kanska meir enn nakar annar bólkur hava tey átrokandi tørv á slíkari lóggávu sum hesari.

– Við hesi lógini tryggjast øllum løntakarum somu rættindi, antin tey eru í almennari ella privatari tænastu, fastlønt ella tímalønt, faklærd ella ófaklærd, øllum teirra tryggjast nú eitt minstamark av týdningarmiklum upplýsingum um setanar- og arbeiðsviðurskifti teirra.

– Í flestu grannalondum okkara eru galdandi lógir, sum á ymsan hátt verja løntakararnar í sambandi við starvssetan teirra. Fáur man vera ósamdur í, at tað er sjálvsagt og náttúrligt, at løntakarin fær allar tær týdningarmestu upplýsingarnar, sum hava atlit til starvssetan hansara, og at arbeiðsgevarin tí skal hava skyldu til at veita løntakaranum hesa upplýsing, sigur Hans Pauli Strøm m.a. í viðmerkingunum til uppskoitð.

# Sanering fyri 67 mió krónur

*Við innskotinum frá landsstýrinum uppá 25 mió. kr. eru 171,9 mió. kr. í kommunala láns- og veðhaldsgrunninum*

ÓLAVUR Í BEITI

Løgmaður, Anfinn Kallsberg, hevur vegna landsstýrið lagt fram uppskot um kommunalan láns- og veðhaldsgrunn og eftir hesum uppskoti, sigur løgmaður, verður fíggjarliga orkan um kommunala láns- og veðhaldsgrunnin flutt millum kommunur og frá landskassanum til kommunurnar soleiðis, at ávísar kommunur eftir teimum reglum, ið ásettar eru í hesum uppskotinum, frá hinum kommununum og landkassanum, fáa fíggjarligt ískoyti, at lætta um skuldarbyrðuna og at lætta um serliga tyngjandi lán.



Og endamálið við hesum er at skapa grundarlag fyri, at allar kommunur, eisini tær, ið eru ringast fyri fíggjarliga, sjálvar evna at gjalda útreiðslur av kommunala rakstrinum og av kommunulánum og at minka um ójavna viðvíkjandi treytunum fyri fígging av kommunuskuld.

**25 mió. aftrat**

Í viðmerkingunum upplýsur løgmaður, at Landsstýrið og umboð fyri kommunurnar eru samd um, at skuldarbyrðan hjá kommununum ikki eigur at vera hægri enn 3 álíkningar við kommunuskattaprosenti 23.

– Landsstýrisins støða er eisini, at tað er ein felags uppgáva hjá kommununum og landsstýrinum at skipa soleiðs fyri, at eingin kommuna mótvegis lániveitarum aftur kemur í eina støðu, sum í roynd og veru er ein gjaldstrotastøða, men at hesar kommunurnar aftur fáa fíggjarlig kjølfesti. Fyri at náa framman fyri nevndu setningum er neyðugt, at lætt verður um skuldina hjá ávísum kommunum við eini upphædd uppá uml. 50 mió kr. Harumframt er ætlanin at nýta uml. 17,9 mio. kr. til endurgjald fyri kurstap av lánum við serliga ólagaligum rentutreytum.

Landsstýrið hevur tí við eykajáttanarlóg frá mars 1998 fingið heimild at nýta 25 mió. kr, at seta í grunnin til nevndu endamál.

**Strika skuld**

Viðvíkjandi ætlanum landsstýrisins, kunnar løgmaður um í viðmerkingunum, og eru tærfyrst og fremst at seta 25 mió. kr. í grunnin, og síðani er ætlanin: at skuld til grunnin hjá nøkrum kommunum verður strikað, at veittur verður studningur úr gruninum til nakrar kommunur at rinda niður lán uttan fyri grunnin, at veittur verður studningur úr grunninum til nakrar kommunur at rinda fyri kurstap í sambandi við umlegging av lánum, at grunnurin, eftir at hetta er gjørt - og eftir at kommunur, sum ynskja tað, hava fingið útgoldið úr grunninum eina upphædd, svarandi til helmingin av tí, ið tilkemur teimum - verður nýttur sum trygd fyri eini felags 5 ára avtalu um umlegging av kommunuskuldini, og at útgjaldingar úr grunninum verða nýttar at rinda niður skuld oman fyri eina álíkning.

Fyri landskassan hevur uppskotið við sær eina meir útreiðslu uppá 25. mió. kr. Fyri kommunurnar hevur uppskotið við sær flytingar millum kommunukassarnar, men hevur ikki við sær meir útreiðslur fyri kommunurnar sum heild, sigur Anfinn Kallsberg m.a. í viðmerkingunum.


-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

**TOYOTA CAMRY 2,2 GL AUT.** (Sýnaður 15-10-98)
Skrás.:13-07-95
Km.: 76.000
Prísur: 158.600,- Garanti*

**TOYOTA COROLLA 1,6 Xli H/BL**
Skrás.: 31-10-96
Km.: 34.000
Prísur: 110.600,-

**TOYOTA CAMRY 2,2 XL**
Skrás.: 21-12-91
Km.: 80.000
Prísur: 98.600,-

**TOYOTA COROLLA 1,3 Xli**
Skrás.: 24-06-97
Km.: -
Prísur: 112.600,-

**TOYOTA CARINA E 1,8**
Skrás.: 06-11-96
Km.: 68.000
Prísur: 119.600,-

**TOYOTA COROLLA 1,3 H/B**
Skrás.: 05-08-92
Km.: 110.000
Prísur: 45.600,-

**TOYOTA CARINA E 1,6 AUT. GEAR**
Skrás.: 24-06-92
Km.: 72.000
Prísur: 89.600,- Garanti*

**FORD ESCORT DIESEL**
Skrás.:19-09-96
Km.: 54.000
Prísur: 114.600,-

**TOYOTA CARINA E 1,6 GL L/B**
Skrás.: 21-08-90
Km.: 124.000
Prísur: 60.600,-

**FORD FIESTA 1,8 DIESEL**
Skrás.: 30-01-96
Km.: 47.000
Prísur: 79.600,- Garanti*

**TOYOTA CARINA 1,6 GL** (Sýnaður 14-10-98)
Skrás.: 01-11-89
Km.: 154.000
Prísur: 49.600,-

**HONDA CIVIC 1,5 H/B**
Skrás.: 01-08-98
Km.: 26.000
Prísur: 119.600,- Garanti*

**TOYOTA CARINA 1,6 DX** (Sýnaður 15-05-98)
Skrás.: 09-06-87
Km.: 212.000
Prísur: 19.600,-

**FORD FIESTA 1,3**
Skrás.: 16-12-97
Km.: 19.000
Prísur: 79.600,- Garanti*

**TOYOTA CAROLLA 1,3 L/B TERRA**
Skrás.: 27-02-98
Km.: 30.000
Prísur: 120.600,-

**FORD FIESTA 1,3**
Skrás.: 29-04-96
Km.: 104.000
Prísur: 59.600,-

**TOYOTA CAROLLA 1,3 SEDAN**
Skrás.: 12-02-96
Km.: 16.000
Prísur: 97.600,- Garanti*

**FORD ESCORT 1,6** (Sýnaður 26-03-98)
Skrás.: 21-05-91
Km.: 128.000
Prísur: 42.600,-

**TOYOTA CAROLLA 1,3 Xli**
Skrás.: 14-07-95
Km.: -
Prísur: 98.600,-

**NISSAN MAXIMA 3,0 AUT. GEAR** (Sýnaður 01-12-99)
Skrás.: 15-12-87
Km.: 135.000
Prísur: 69.600,-

**AVHEINTINGARTILBOÐ**

**FORD SIERRA 1,6 AUT. GEAR** (Sýnaður 01-10-98)
Skrás.: 01-07-87
Km.: 117.00
Prísur: 10.000,-

**MAZDA 626 SEDAN** (Sýnaður 24-06-99)
Skrás.: 09-01-87
Km.: 172.000
Prísur: 5.000,-

**SERTILBOÐ**

**KIA CLARUS 1,8 SEDAN**
Skrás.: 16.04.98
Km.: 13.000
Prísur: 98.600,-
Garanti*
-í besta standi!!

**VØRUVOGNUR**

**MITSUBISH I PAJERO VAN**
Skrás.: 05-10-95
Km.: 80.000
Prísur: 154.600,-

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrstu skrás. dato

REYNI SERVICE
Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00




Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040
Sosialurin - 311820